# KVINNUR VIÐ VÓN

## Bønaráheitanir fyri mars 2024

1. Harri, lat einleika ráða í Kristi samkomu í øllum heiminum við Anda Tínum. Umbroyt okkum, so at vit elska Teg fram um alt annað, og elska hvønn annan sum limir av Tínum likami. (Efesusbr. 4: 2-3)
2. Harri, gev kvinnum í Domingolýðveldinum áræði at boða evangeliið á arbeiðsplássum, skúlum og millum familjulimir, vinir og grannar. (1.Pætursbr. 3:15-16)
3. Faðir, troysta hjørtuni á brasilskum mammum, sum hava mist børn síni í yvirgangi í størru býunum, ella eru saknað. (Opinberingin 21:4)
4. Harri, hjálp kvinnum, ið er latnar leysar úr fongslum í Paraguai, at koma inn aftur í samfelagið á rættan hátt, so at tær ikki venda aftur til lívið í kriminaliteti. (Galatiabr.6:1)
5. Gud, hjálp ungum kvinnum í Urugai at taka við bíbilskum meginreglum, so tær ynskja at halda seg kynsliga reinar, til Tú leiðir tær til ein trúfastan, kærleiksfullan maka. (1.Korintbr. 6:18)
6. Harri, vit biðja fyri stjórnarleiðarum í Bonaire. Gev teimum vísdóm til at taka rættar avgerðir fyri oynna, og nýta tíðina rætt millum arbeiði og heim. (1.Timoteusbr. 2:1-2)
7. Faðir, vit venda okkum til Tín um at grøða sinnini og kenslurnar hjá ungu kvinnunum í USA. Lat tær finna samleika sín, kelduna til sannleikan, og meiningina í lívinum í Tær. (Filippibr. 4:6-7)
8. Vit prísa Tær, Gud, fyri stuðlar í trúartænastuni um alt Kanada, ið trúføst biðja fyri kvinnum í øllum heiminum við at nýta bønarkalendaran hvønn mánað. (Jákupsbr. 5:16b)
9. Faðir, hjálp kvinnunum í Dominolýðveldinum at gerast andaliga búnar, so at alment trýst ikki dregur tær burtur frá at fylgja Tær í trúfesti. (Hebrearabr. 5:14)
10. Harri, vit biðja Teg um at loysa og frelsa kvinnur í Brasil, sum liva í skøkjulevnað**i**. Lat tær finna grøðing og satt frælsi í Tær. (Jóhannes ev. 8:36)
11. Gud, vit biðja, at vaksandi rákið av kvinnumorðum í Paraguai má steðga. Hjálp samkomunum og stjórnini at seta røttu tiltøkini í verk, ið eru neyðug fyri at bjarga hesum kvinnum. (Sálmur 138:7)
12. Vit eru takksom fyri møguleikan at taka upp bønaráheitanir til útvarpið í Uruguai. Takk, Harri, fyri tær kvinnur, ið biðja saman við okkum, tá ið tær lurta. Efesusbr.1:16)
13. Himmals**ki** Faðir, gev teimum tolinmóð og vísdom, ið arbeiða við rúsevnis misnýtarum í Bonaire. Lat atvoldina til hesar misnýtslur verða gjørdar til einkis, og langtíðarloysnir verða funnar.(1. Korintbr.10:13)
14. Faðir, hjálp kvinnum í USA at finna tíð til miðvíst at leita til Tín í strævna gerandisdegnum. Lat kærleikan, tær sýna Tær, vera yvir øllum øðrum. (Sorgarsongirnir 3:25)

15. Harri, signa og vegleið tey í TWR trúarverkinum í Kanada, sum hava tikið stig til at hjálpa kanadiskum trúgvandi kristnum, hvussu tey kunnu boða evangeliið til fleiri mentanir í nærumhvørvinum. (Ápostlasøgan 1:8)
16. Gud, vilt Tú styrkja møddu mammurnar í Domingolýðveldinum; ger, at tær verða hoyrdar, tá ið tær siga frá, hvat teimum tørvar. (Esaias 40:29)
17. Harri, Tú biður okkum um ikki at kúga tey fremmandu. Lat lógir verða smíðaðar ið kunnu verja og hjálpa kvinnum og børnum, ið eri flóttafólk í Brasil. (2.Mósebók 22:21)
18. Gud, gev kvinnum í Paraguai vísdóm og skil frá Tær, so tær ikki loyva sær at vera fyri kensluligum og kropsligum ágangi. (Jákupsbr. 1:5)
19. Harri, hjálp gentum í tannárunum í Uruguai, ið hugsa um at gera sjálvmorð, at síggja sítt virði og endamál í lívinum. Hjálp teimum at endurbyggja virðingina fyri sær sjálvum og sín samleika, so tær saman við Tær kunnu byggja framtíð sína. (Jeremias 29:11)
20. Harri, Gud, lat tey í Karibiska økinum yvirgeva sítt lív til Kristus og lýða læru Hansara, so tey kunnu hava eina bjarta framtíð. (Orðtøkini 16:3)
21. Gud, lat kvinnurnar í Domingolýðveldinum, ið arbeiða heima við hús, skilja fyrimunin og signingina at tæna familjum sínum.(Orðtøkini 11.25)
22. Faðir, veit gev TWR Kvinnur við Vón toyminum í Brasil vísdóm frá Tær, skapanarevni og íblástur at gera tilfar, ið hevur ávirkan og og e**r** viðkomandi í trúartænastuni. (Orðtøkini 2:6)
23. Harri, síggj til aldrandi ommurnar í Paraguai, har teirra børn hava svikið tær, so at summar av teimum enntá búgva á gøtuni. Nem hjørtuni á børnunum, so tey virðismeta tær og taka sær av teimum. (1.Timoteusarbr. 5:3-5)
24. Harðskapur grundaður á kyn er nógvastaðni í Paraguai. Harri, nem hjørtuni á monnum, ið fremja harðskap móti konum og børnum. Lat teir finna frelsuna í Kristusi og læra at elska familjur sínar. (Matteus ev. 19:25-26)
25. Faðir, vit biðja Teg um at verja familjuna hjá einligum foreldrum í Karibiska økinum. Vegleið foreldrini, hvussu tey skulu elska, vísa áhuga, og taka sær av børnunum. (1:Timoteusarbr.5:8)
26. Gud, hjálp kvinnunum í Domingolýðveldinum at vera varugar við og nýta tær gávur og evni, ið Tú hevur givið teimum, Tær til dýrd. (Rómbr.12:6-8)
27. Harri, gev kvinnuligu starvsfólkunum í heilsuverkinum í Paraguai vit og skynsemi at taka sær av økta talinum av sjúklingum við sálarsjúku. (Sálmur 34:18-19; ensk: 17-18)
28. Faðir, Tú skapti bæði menn og kvinnur í Tínari mynd. Broyt hjørtu og sinni á menniskjum, so tey viðurkenna javnrættindini hjá kvinnum í Brasil og virðismeta tær á arbeiðsplássunum. (Orðtøkini 31:16-17)
29. Lat kristnar trúgvandi kvinnur í Uruguai standa fastar í sínari sannføring, Harri, og viðurkenna ábyrgdina av at boða evangeliið fyri øðrum. (Rómbr.1:16)
30. Gud, Faðir, vilt Tú avdúka tey, ið hava við menniskjahandil at gera í Bonaire, og grøð tey, ið eru fríað úr fangilsi. (Sálmur 82:3-4)
31. Harri, lat samfeløg og almennar stovnar í Paraguai veita kvinnum, ið eru í kreppu, bæði persónliga, kensluliga og í familjuni, samkennandi umsorgan. (Rómbr. 12:13)

**”Høvuðsstuðulin í øllum kristiligum arbeiði er bøn”**

**(Eeva Vähäsarja)**

# Undirvísa, lívga, útgera kvinnur til at læra, biðja, lurta, vaksa og geva

***KVINNUR VIÐ VÓN***

**twrwomenofhope.org**

## Einki kann samanberast við Jesus –

## At grípa vónina – eftir Susie Pek - mars 2024

“Hvussu eitur tú?” er ein av fyrstu spurningum, vit læra, tá ið vit skulu læra eitt nýtt mál. Nøvn eru týdningarmikil. Tey siga, hvørji vit eru. Hvørja ferð, vit hoyra eitt navn, seta vit tað í samband við ein persón, eina rødd, eina søgu, ja, enntá eitt heilt lív!

Eitt navn er ført fyri at vekja kenslur í okkum. Kanska smílast vit, gerast kensluborin, ella gerast bangin, tá ið vit hoyra eitt navn. Vit kunnu enntá læra at elska eitt navn, tí tað minnir okkum um ein serstakan persón. Hvat hugsar tú um, tá ið tú hoyrir navnið Jesus? Eg vóni, at tað fær teg at smílast.

Eitt tað fyrsta, eg hugsi um, er, at navn Hansara er yvir øllum øðrum nøvnum. Síðani fer hugur mín við tað sama til Esaias 9:6: “Tí Barn er føtt okkum, Sonur er givin okkum, og á øksl Hansara skal harraveldið hvíla; Hann *eitur Undurfullur, Ráðgevari, Veldigur Gud, Ævigur Faðir, Friðarhøvdingi*.” Hetta ørindið gevur okkum eina sæla vón í dag. Vit ganga ikki einsamøll gjøgnum lívið; vit líta á ein Gud, ið er nógv størri enn hugur okkara kann fata.

Lívið snýr seg um at taka avgerðir. Mangan hava vit tørv á at hava onkran at tosa við, onkran, ið kann lýsa okkum vegin. Jesus er Undurfulli Ráðgevari okkara. Hann er førur fyri at veita vegleiðing í øllum lívsins umstøðum. Vit kunnu fara til Hansara við øllum at biðja um ráð. Hann lurtar eftir okkum og bjóðar seg til at vegleiða okkum. Frelsari okkara er ein Veldigur Gud. Hann er ein sterkur stríðsmaður, ið fylgist við okkum. Einki er ov torført ella ógjørligt fyri Hann. Hann er mentur at frelsa okkum. Jesus er

Ævigi Faðir okkara, Almáttugi Harri okkara – høgt yvir øllum broytingartíðum. Hann, ið vakir yvir børnum Sínum í kærleika, ið grøðir og troystar tey. Hann er ein fullkomin, vinarligur, mildur og miskunnsamur Faðir. Hann hevur altíð verið, og fer altíð  at vera Gud.

Jesus er eisini Friðarhøvdingin. Vit hava frið við Gud gjøgnum Jesus. "Rættvísgjørd av trúgv hava vit tí nú frið við Gud við Harra okkara Jesusi Kristi" (Rómbr. 5:1). Hann er friður okkara í trongdum. "Hetta havi Eg talað til tykkara, fyri at tit skulu hava frið í Mær. Í heiminum hava tit trongd, men verið hugreystir – Eg havi sigrað yvir heiminum!" (Jóhannes ev. 16:33). Eina hann bjóðar frið, sum stígur upp um alt vit, og kann geva frið til stúrin, óttafull ella friðleys hjørtu, tá ið mest leikar á í lívinum. Navnið Jesus er undurfult! Tað er als eingin sum Hann. Einki kann metast við Hann.

Tað kann vera troystarleyst at lesa tíðindini og hyggja at heiminum rundan um okkum, ja, enntá lesa um alt tað ræðuliga, ið kvinnum er fyri, sum vit biðja fyri teimum. Men so verða vit mint á, hvør Gud er! Tað broytir alt. "Við tað at vit nú hava stóran Høvuðsprest, sum er farin gjøgnum Himlarnar, Jesus, Son Guds, so latið okkum halda fast við játtingina! Tí vit hava ikki Høvuðsprest, sum ikki kann hava samkenslu við veikleikum okkara, men ein, sum er freistaður í øllum á sama hátt sum vit – tó uttan synd. Latið okkum tí við dirvi stíga fram fyri hásæti náðinnar, so vit kunnu fáa miskunn og finna náði til hjálp í rættari tíð!" (Hebrearabr. 4:14-16). Tá ið vit koma fram fyri náðihásæti Hansara, koma vit fram fyri ein háttvirdan Gud.

Hvussu ofta tekur tú tær tíð til at "skoða" vakurleika Kristusar. Kann eg eggja teg til at gera hetta í stillu løtu tíni saman við Honum? Einki og eingin kann samanberast við Hann.

Í kærleika Frelsarans,

Susie

**Fíggjarstuðul:**

**EvR (Evangeliska Røddin) hevur konto í Betri Banka nr. 9181 000 533 7145**

**til at flyta pening tilskilað til TWR (Trans World Radio). –**

**Allur stuðul, sum kemur inn á hesa konto fer óskerdur til arbeiðið hjá TWR. –**

**TWR PO Box 12, 82002 Bratislava 22 – Slovakia — twre@twr.org**